gult22 cyan22 magenta22 svart22



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Leiðari

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir leiðara, 30 tímar um vikuna, til frítíðarskúlan á Argjum.

**Stovnslýsing**
Frítíðarskúlin liggur í einum sera náttúruríkum og avbjóðandi umhvørvi. Á stovninum eru 28 børn, sum ganga í 1. flokki í Argja skúla. Stovnurin er opin frá kl. 07.30 til 11.30 tríggjar dagar um vikuna og til kl. 12.30 tveir dagar um vikuna.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert arbeiði, har tú fært møguleika fyri at seta tín dám á stovnin.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin:

- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir (er fyrimunir)
- kann arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir, tá ið tað snýr seg um virksemið í einum frítíðarskúla
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur kunnleika til EDV

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Katrina Petersen, samskipara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 31 51 60.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. august 2001. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 23. juli 2001.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pedagogur

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogi til frítíðarskúlan í Hornabø.

**Starvið**
Talan er um eitt pedagogstarv, 20 tímar um vikuna, har arbeitt verður seinnapart.

**Stovnslýsing**
Á frítíðarskúlanum í Hornabø, ganga 40 børn. Karmarnir eru góðir til mennandi virksemi, bæði innan- og uttandura.

Økið rundan um er barnavingarligt og møguleikarnir til virksemi úti í náttúruni eru fjølbroyttir.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv, har umsøkjarin fær møguleika at virka í einum umhvørvi, sum er í støðugari menning.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin:

- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- er førur fyri, at arbeiða sjálvstøðugt
- er áhugaður í uttandura virksemi, har veðrið ikki er ein forðing
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og skúlan
- er við til at menna tað pedagogiska virksemi

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 6. august 2001. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri. Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Ann-Elisabeth Joensen, leiðara, tlf. 31 85 75 / 25 68 10, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skal vera frítíðarskúlanum í Hornabø, Hornagøta 13, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 21. juli 2001.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Kollfirðingar

Kommunuskrivstovan er stongd frá 16. juli til 17. august 2001.

Til ber at seta seg í samband við Snarskivuna tlf. 315160, fax. 314860 ella teldupost: torshavn@torshavn.fo.

Tórshavnar kommuna
Snarskivan

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Viðvíkjandi ÚTBJÓÐING

Viðvíkjandi útbjóðing av tveimum nýggjum dagstovnum, at langtíðarleiga Tórshavnar kommunu.

Freistin at lata inn tilboð er longd fram til 1. september 2001 kl. 15.00.

Freistin at biðja um tilfar er longd samsvarandi fram til 25. juli 2001.

Teir/tey, ið longu hava fingið útflýggjað tilfar verða biðin um at venda sær til Snarskivuna, har ískoytistilfar til útbjóðingartilfarið fæst.

Tórshavnar kommuna
Byggi- og býarskipanardeildin

SNARSKIVAN

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!

Sosialurin
www.sosialurin.fo

gult23 cyan23 magenta23 svart23



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Leiðari

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir leiðara til útibarnagarðin í Havnadali.

**Stovnslýsing**
Í Havnadali búleikast 20 børn í aldrinum 5 til 7 ár.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum grannalagi, har náttúran hevur stóran týdning í dagliga arbeiðinum.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin:

- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir (er fyrimunir)
- kann arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir, tá ið tað snýr seg um virksemið í einum útibarnagarði
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum
- dámar at vera úti saman við børnunum

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Katrina Petersen, samskipara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 31 51 60.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. august 2001 ella eftir avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 23. juli 2001.

SNARSKIVAN




TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Varðaleiðari og pedagogur

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir varaleiðara og pedagogi til Miðstovnin í Gundadali.

**Størvini**
Talan er um 1 varaleiðarastarv 40 tímar um vikuna, og 1 pedagogstarv, 30 tímar um vikuna.

**Stovnslýsing**
Á stovninum ganga 48 børn í aldrinum 5 til 10 ár.

**Vit bjóða**
tvey áhugaverd størv, í einum grannalagi har ítróttur og náttúran hava stóran týdning í dagliga arbeiðinum.

Varaleiðarin verður partur av einum virknum leiðaratoymi.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin:

- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgunum
- kann arbeiða sjálvstøðugt, og taka avgerðir
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- dámar at vera úti saman við børnunum

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett í august ella nærri eftir avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Astu Hjelm, leiðara, tlf. 22 37 76, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Miðstovninum í Gundadali, Gundadalsvegur 4, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 27. juli 2001.

SNARSKIVAN




TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Kunngerð

**Í sambandi við søluloyvi á ólavsøku 2001:**

Loyvt er ikki at selja serpentin sprayblikk, vørur í ílati av blikki ella glasi, cowboyhattar úr plastikk- ella pappírstilfari og heldur ikki seyðarhøvd.

Fyri tær vørur, ið loyvt er at selja, verður víst til løgtingslóg um afturlatingartíðir fyri handlar, lýst í kunngerðarblaðið nr. 14, 4. juli 1991.

Fyri aðrar sølubúðir, ið ikki eru umfataðar av afturlatingarlógini, verður víst til tey loyvi, ið Føroya landfúti hevur útskrivað til hesar búðir. **Mint verður á, at loyvini mugu ikki latast øðrum.**

Tórshavnar kommuna áleggur øllum, ið hava kiosk ella aðra sølubúð, at hava nóg mikið av ruskílátum og støðugt at halda økið uttan um búðirnar ruddiligt.

**UPP- OG AFTURLATINGARTÍÐIR Á ÓLAVSØKU 2001**

Vísandi til løgtingslóg um afturlatingartíðir fyri handlar § 4, stk. 3, skal við hesum verða boðað frá, at handlar í Tórshavnar kommunu í sambandi við ólavsøkuna kunnu hava opið 27. juli til kl. 21.00, 28. juli til kl. 02.00 og 29. juli frá kl. 14.00 til 02.00.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Kunngerð

Tað verður við hesum gjørt kunnugt, at býráðið á fundi 28. juni 2001 samtykti, at vegurin til útstykkingina vestan fyri Løgmannabreyt og sunnan fyri Jørundargøtu fær navnið:

***Torkilsgøta***

Tórshavnar býráð

SNARSKIVAN